Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður við heilsumálum

Evni: Endurvenjingar

Spurningar:

1. Bjóða allar privatar sjúkratryggingar sjúklingunum endurvenjing, um hetta verður mett neyðugt?

2. Fáa allir sjúklingar, sum hava fingið viðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum, og sum hava tørv á endurvenjing, men sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa tilboð um hetta frá síni trygging, tilboð um endurvenjing frá heilsuverkinum?

3. Hvussu verða sjúklingarnir kunnaðir um hetta?

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum vikum síðani setti undirritaði ein § 52a fyrispurning um endurvenjing (tingmál nr. 52-192/2021). Spurt varð, hvør orsøkin er til, at fólk, ið fáa skurðviðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum, missa rættin til endurvenjing í heilsuverkinum?

Í svarinum verður sagt, at flestu sjúklingar, ið velja at fara aðrastaðnis til skurðviðgerð, hava møguleikan at fáa endurvenjingina frá privatari klinikk við ávísing frá kommunulækna, og at um talan er um eina serliga kompliseraða endurvenjing, sum krevst, ella endurvenjing, sum ikki finnist í privata geiranum, kann kommunulæknin senda ávísing til Sjúkrahúsverkið um at lyfta uppgávuna.

Fyri at fáa nærri greiði á, í hvønn mun sjúklingar fáa tilboð um endurvenjing, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 9. juni 2022

Helgi Abrahamsen